# Fútaforboð ímóti nýggju listabókini

**Hósdagin tóku bókhandlarnir kring landið nýggju lisatabókina hjá Bárður Jákupsson av hillini, tí Fútarætturin setti forboð var sett fyri at selja hana. Orsøkin er stríð um rættindi til nakrar myndir í bókini**



*Hósdagin varð nýggja myndalistasøgan hjá Bárður Jákupsson tikin av hillunum í bókasølunum kring landið. Stríð er um rættindi til nakrar av myndunum í bókini.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

LISTASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*

Nú jólasølan er í hæddini, er ein av forvitnisligu og vøkru bókunum, sum kom út til jóla, tikin av hillunum í bókasølunum kring landið.

Bárður Jákupsson hevur savnað føroysku myndlistasøguna í eini snøggari bók, sum hevur heitið Myndlist í Føroyum, men hendan bókin fæst ikki til keyps í løtuni.

Hósmorgunin setti Fútarætturin forboð fyri, at bókin kann seljast, tí neyðugu loyvini eru ikki fingin til at prenta 9 av myndunum í bókini.

Tær 9 myndirnar eru av listarverkum hjá nólsoyinginum Steffan Danielsen, sum Bókagarður eiga øll rættindi til at brúka. Emil Thomsen, sum rekur Bókagarð, kravdi í Fútarættinum, at sølan av bókini varð steðgað, og hesum tók dómarin undir við.

– Hetta er ein spurningur um at fáa neyðugu loyvini til vega og at brúka røttu mannagondina. Tað er ikki gjørt við myndunum hjá Steffan Danielsen, sum Emil Thomsen eigur øll rættindi til, og tí er endurgevingin ólóglig, sigur Turið Debes Hentze, sum er advokatur hjá Emil Thomsen.

## Høvundin skelkaður

Høvundin av bókini, Bárður Jákupsson, er ovfarin av hendingini.

– Eg eri framvegis skelkaður av hesum. Eg haldi, at hetta er ljótt gjørt av Bókagarði, og eg kann bara ímynda mær, at hetta er fyri at gera okkum fortreð, sigur Bárður Jákupsson.

– Ein slík yvirlitsbók yvir føroyska list kundi ikki verið gjørd uttan Steffan Danielsen. Arvingarnir hjá honum kundu ikki lata okkum loyvi at brúka myndirnar, men tá talan er um slíkt yvirlitsverk, hildu vit ikki, at teir kundu siga nei.

Bárður Jákupsson vísir á, at hóast hann hevur brúkt nøkur av verkunum hjá Steffan Danielsen í síni bók, er tað einki sum forðar fyri, at onkur annar – til dømis Bókagarður – kann gera eina sjálvstøðuga bók um listamannin. Talan er um hvør sína útgávu, og tá hetta er ein myndlistasøga má høvundin hava loyvi at endurgeva viðkomandi verk.

Hesa fatan hevur advokaturin hjá Emil Thomsen ikki.

– Um høvundin frammanundan hevði tryggjað sær rættindini til at brúka hesi verkini, so var eingin trupulleiki. Tað ber ikki til at brúka hesi verk uttan neyðugu loyvini, og tí hava vit kravt fútaforboð ímóti bókini, sigur Turið Debes Hentze.

## Smeitur fyri forlagið

Bárður Jákupsson hevur gjørt føroysku listasøguna fyri danska forlagið Atlantia, sum síðani hevur samstarvað við føroyska forlagið, Sprotan, um føroysku útgávuna.

Myndlist í Føroyum er komin út bæði í Føroyum og í Danmark, og tað er eisini bæði føroyska og danska útgávan, sum eru steðgaðar av fútaforboðnum.

– Hetta er sera óheppið fyri okkum, tí vit missa ein part av jólasøluni, og tað kann fara at kosta pengar, sigur Jonhard Mikkelsen á forlagnum Sprotanum.

– Bókin er ikki ein veruligur bestseljari, men vit høvdu vónað, at vit kundu fáa okkara útreiðslur innaftur. Tað fer ikki at bera til, nú bókin er tikin av hillini, og tí fáa vit helst eitt hall upp á einar 100.000 krónur av hesi útgávuni, sigur hann.

Hetta er ein dyggur smeitur hjá Sprotanum, men forlagið og høvundin vóna nú, at landsrætturin fer at ógildað fútaforboðið, sum er kært til landsrættin.

Men í øllum førðum fer ein partur av jólasøluni fyri skjeyti.

Skiftisnæmingur úr Ný Sælandi:

# – Eg elski tykkum

**– Føroyingar eru ómetaliga vinarligt fólkaslag, og mær dámar so væl at vera her, at eg ætli mær avgjørt at leggja leiðina aftur til Føroyar um ikki so langa tíð, sigur Justine Peters úr Ný Sælandi. Nú eru foreldur hennara komin til Føroyar at uppliva føroysk jól, áðrenn tey øll fara suðuraftur til heimlandið um eina viku**

SKIFTISNÆMINGUR
*Stefan í Skorini*

Tá tú situr og tosar við hesa prátingarsomu gentuna, fært tú beinanvegin frænir av, at hon hevur búð á sunnastu oyggj okkara. »Nei tvass« letur í henni í heilum, eftir at hon hevur sagt ein setning á enskum við ramligari ný sælendskari dialekt.

Fyri ellivu mánaðum síðani kom 17 ára gamla Justine Peters úr New Zealand til Føroyar sum skiftisnæmingur. Hon hevur búð hjá 19 ára gomlu Heidi Joensen úr Vági ta tíðina, hon hevur búleikast í Føroyum.

Justine er uppvaksin á bóndagarðinum hjá foreldrum sínum, sum hevur eini 24.000 seyðir og eini 1000 neyt.

Tey búgva rættiliga avsíðis, og tey hava ongar grannar búgvandi nærhendis.

– Heima í New Zealandi búgva vit rættiliga avsíðis. »In the middle of nowhere«, sum hon tekur til. Tískil er hon ikki heilt ókend við tey smáu viðurskiftini í Føroyum.

Beint við húsini hjá teimum rennur ein á. Eingin onnur á, sum er á sunnaru jarðarhálvu, hevur so nógv vatn rennandi ígjøgnum um tíman. Áin er ein lítil stoltleiki hjá familjuni og teimum, sum búgva har um leiðir.

## Skilir ikki tey eldru

Justine sigur seg kunna fylgja við í eini samtalu millum tveir ungar føroyingar, men tá tey eldru tosa saman, tá er beinanvegin eitt sindur verri.

– Tey eldru tosa eitt heilt annað mál enn tey yngru, og tí havi eg ilt við at skilja, hvat tey royna at siga við meg, sigur Justine.

– Eg var eitt sindur bangin fyri at læra føroyskt at byrja við, og tað hevur heldur ikki verið lætt, tí tey flestu tosa enskt við meg, men nú kann eg samskifta á føroyskum uttan stórvegis trupulleikar, sigur Justine.

Tá Justine kom til Føroyar, hevði hon ongantíð verið umborð á ferju ella skipi. Men nú hevur hon verið um Suðuroyarfjørð nakrar ferðir við Smyrli.

– Eg var so bangin, at eg tók bara nógvar tablettir og svav so allan vegin, sigur Justine.

Ymiskt er, hvussu merkisdagar verða hátíðarhildnir í Føroyum og Ny Sælandi.

– Nógv verður gjørt burturúr føðingardøgum her í Føroyum. Øll familjan kemur saman, og tað eru eini tíggju ymiskar køkur at eta. Vit plaga at hava eina.

## Halda longri á

Justine hevur gingið í miðnámsskúlanum í Vági, meðan hon hevur búð í Føroyum. Tískil hevur hon saman við flokkinum upplivað, hvussu føroyskur ungdómur heldur sær á gleimi og stuttleikar sær.



*Justine Peters hevur búð í Vági seinasta árið. Hon heldur, at føroyingar eru tað vinarligasta fólkaslagið, sum hon veit um, og tí ætlar hon sær at koma aftur hendavegin um tvey ár*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Her eru tey oftari í veitslum og úti í býnum enn har heima. Tá eg havi verið í veitslum hava øll verið so ómetaliga vinarlig, og tey hava tosað við meg uttan yvirhøvur at kenna meg áðrenn.

– Í Føroyum verður farið í veitslu nakað seinni á kvøldi, og so halda tey á til tann ljósa morgun, men heima plaga vit at fara út um sjey tíðina og heimaftur klokkan tvey.

Eitt annað, sum Justine hevur bitið merki í er, at føroyskur ungdómur svevur ógvuliga nógv og ger ikki so nógvan ítrótt. Gløgt er gestsins eygað.

## Vilja uppliva føroysk jól

Við í flúgvaranum til Føroyar hósdagin vóru hjúnini Trevor og Karen Peters, sum eru foreldur at Justine.

Tey eru komin til Føroyar at uppliva føroysk jól, og tey gleða seg ómetaliga nógv til høgtíðina.

– Hvar eru trøðini, var tað fyrsta eg spurdi meg sjálva, tá vit skuldu lenda við flogfarinum, sigur Karen.

– Annars eru vit ógvuliga undrandi yvir, hvussu góð viðurskiftini eru her á oyggjunum. Eg væntaði ikki at síggja asfalt á vegunum, tá tað búgva so fá fólk her, sigur Trevor læandi.

Hóast Justine hevur verið her í eitt lítið ár, so dámar henni ikki spik, ræstan fisk ella ræst kjøt, hóast føroyski pápi hennara hevur roynt at fingið niður í hana.

Hóast Justine fer avstað nú, so fer hon at síggja gamla flokkin í Vági aftur. Flokkurin fer námsferð til Turkalands, og tá fer hon við úr Ný Sælandi.

At enda vil Justine takka øllum teimum, sum hava hjálpt henni, so hon hevur følt seg heima.





# Tórshavnar kommuna
# BUSSLEIÐIN




| KOLLAFJARÐARLEIÐIN LEIÐ 5 | Mánadag - fríggjadag | | | | | Leygardag | | | | Sunnudag | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Farstøðin | 6:15 | 12:15 | 15:30 | 18:00 | 21:00 | 9:00 | 12:15 | 18:00 | 21:00 | 12:15 | 18:00 | 21:00 |
| SMS | 18 | 18 | 33 | 3 | 3 | 3 | 18 | 3 | 3 | 18 | 3 | 3 |
| Rundkoyringin á Hálsi | 20 | 20 | 35 | 5 | 5 | 5 | 20 | 5 | 5 | 20 | 5 | 5 |
| Studentarskúlin | 22 | 22 | 37 | 7 | 7 | 7 | 22 | 7 | 7 | 22 | 7 | 7 |
| Hvítanes | 24 | 24 | 39 | 9 | 9 | 9 | 24 | 9 | 9 | 24 | 9 | 9 |
| Sandvíkarhjalli | 25 | 25 | 40 | 10 | 10 | 10 | 25 | 10 | 10 | 25 | 10 | 10 |
| Sund | 30 | 30 | 45 | 15 | 15 | 15 | 30 | 15 | 15 | 30 | 15 | 15 |
| Kaldbaksbotnur | 35 | 35 | 50 | 20 | 20 | 20 | 35 | 20 | 20 | 35 | 20 | 20 |
| Busssteðgipláss við tunnilsmunnan | 41 | 41 | 56 | 26 | 26 | 26 | 41 | 26 | 26 | 41 | 26 | 26 |
| Íbinding Signabø )1 | 42 | 42 | 57 | 27 | 27 | 27 | 42 | 27 | 27 | 42 | 27 | 27 |
| Íbinding til havnaøkið (á bygdavegnum) | 45 | 45 | 16:00 | 30 | 30 | 30 | 45 | 30 | 30 | 45 | 30 | 30 |
| Skúlin | 51 | 51 | 6 | 36 | 36 | 36 | 51 | 36 | 36 | 51 | 36 | 36 |
| Kjalnes | 56 | 56 | 11 | 41 | 41 | 41 | 56 | 41 | 41 | 56 | 41 | 41 |
| Landsvegur / norðuri í Sundi | 7:00 | 13:00 | 16:15 | 18:45 | 21:45 | 9:45 | 13:00 | 18:45 | 21:45 | 13:00 | 18:45 | 21:45 |
| | | | | | | | | | | | | |
| Norðuri í Sundi | 7:10 | 13:10 | 16:25 | 18:55 | 21:55 | 9:55 | 13:10 | 18:55 | 21:55 | 13:10 | 18:55 | 21:55 |
| Skúlin | 17 | 17 | 32 | 19:02 | 22:02 | 10:02 | 17 | 19:02 | 22:02 | 17 | 19:02 | 22:02 |
| Íbinding til havnaøkið (á bygdavegnum) | 25 | 25 | 40 | 10 | 10 | 10 | 25 | 10 | 10 | 25 | 10 | 10 |
| Íbinding Signabø )1 | 28 | 28 | 43 | 13 | 13 | 13 | 28 | 13 | 13 | 28 | 13 | 13 |
| Busssteðgipláss við Tunnilsmunnan | 29 | 29 | 44 | 14 | 14 | 14 | 29 | 14 | 14 | 29 | 14 | 14 |
| Kaldbaksbotnur | 35 | 35 | 50 | 20 | 20 | 20 | 35 | 20 | 20 | 35 | 20 | 20 |
| Sund | 40 | 40 | 55 | 25 | 25 | 25 | 40 | 25 | 25 | 40 | 25 | 25 |
| Sandvíkarhjalli | 45 | 45 | 17:00 | 30 | 30 | 30 | 45 | 30 | 30 | 45 | 30 | 30 |
| Hvítanes | 46 | 46 | 1 | 31 | 31 | 31 | 46 | 31 | 31 | 46 | 31 | 31 |
| Studentarskúlin | 48 | 48 | 3 | 33 | 33 | 33 | 48 | 33 | 33 | 48 | 33 | 33 |
| Rundkoyringin á Hálsi | 50 | 50 | 5 | 35 | 35 | 35 | 50 | 35 | 35 | 50 | 35 | 35 |
| Norðurlandahúsið | 52 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Handilsskúlin | 57 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Tekniski skúlin | 8:00 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Landssjúkrahúsið | 3 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Steinatún | 7 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Farstøðin | 8:10 | 14:10 | 17:25 | 19:55 | 22:55 | 10:55 | 14:10 | 19:55 | 22:55 | 14:10 | 19:55 | 22:55 |

Galdandi frá 01.01.2001

)1 Mini bussur til og frá Signbø í sambandi við leiðina til og frá Havnini

Til tann 20.01.2001, tá koyrandi er aftur eftir Marknagilsvegnum, verður koyrt eftir Svalbardsvegnum og Landavegnum, í sambandi við fyrsta túrin gerandisdagar.

Broytingar, ferðaseðlakostnaður o.a. sí verandi ferðaætlan hjá Bussleiðini




| LEIÐ 6 | Mánadag-fríggjadag | Leygardag | Sunnudag |
|---|---|---|---|
| Farstøðin | 07.10 - 18.10 | 07.10 - 18.10 | 10.10 -17.10 |
| Steinatún | 13 | 13 | 13 |
| Landssjúkrahúsið | 18 | 18 | 18 |
| Argja skúli | 20 | 20 | 20 |
| Hamarin | 23 | 23 | 23 |
| Argja skúli | 26 | 26 | 26 |
| Tekniski skúli | 30 | 30 | 30 |
| Handilsskúlin | 32 | 32 | 32 |
| Norðurlandahúsið | 37 | 37 | 37 |
| Rundkoyring á Hálsi | 38 | 38 | 38 |
| Studentaskúlin | 40 | 40 | 40 |
| Mjólkavirkið | 42 | 42 | 42 |
| á Flat )1 | 45 | 45 | 45 |
| Berjabrekka | 47 | 47 | 47 |
| Rundkoyring á Hálsi | 50 | 50 | 50 |
| Tyrlupallur Yviri við Strond )2 | 55 | 55 | 55 |
| Farstøðin | 0 | 0 | 0 |

Galdandi frá 01.01.2001

) 1: Koyrt verður Millum Gilja fyrsta túr mánadag - fríggjadag í tíðarskeiðnum 15 august - 01 juni

) 2: Koyrt verður Hoyvíksveg - Eysturskúlan fyrsta túr
mánadag - fríggjadag í tíðarskeiðnum 15 august - 01 juni

Til tann 20.01.2001, tá koyrandi er aftur eftir Marknagilsvegnum, verður koyrt eftir Landavegnum og Svalbardsvegnum

Broytingar, ferðaseðlakostnaður o.a. sí verandi ferðaætlan hjá Bussleiðini

Leið 6 í verðandi ferðaætlan í Bussleiðini verður niðurløgd frá 01.01.2001

Tórshavnar kommuna